


# HB fekk ikki sín vilja

**Heðin Askham fekk ikki nóg nógvar atkvøður til at gerast varalimur í nevndini hjá FSF**

FSF ÁRSAÐAL-FUNDUR
*Jákup Mørk*

Tað eydnaðist ikki hjá HB at fáa eitt nýtt umboð fyri felagið í nánd av FSF nevndini, eftir at tað var greitt, at Børge B. Hansen ikki fór at halda fram sum næstformaður í FSF.

Á aðalfundinum bar tað til at seta uppskot fram til eykalimir. FSF nevndin skeyt upp, at velja Mortan Poulsen og Sveinbjørn Danielsen, sum frammanundan høvdu verið eykalimir. Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, skeyt upp at velja Heðin Askham sum eykalim.

Tá ið trý uppskot vóru til tveir sessir, var neyðugt við atkvøðugreiðslu. Mortan Poulsen fekk seytjan atkvøður, Sveinbjørn Danielsen fekk fjúrtan atkvøður, og Heðin Askham fekk átta atkvøður. Harvið vóru Mortan og Sveinbjørn afturvaldir sum eykalimir.

Undan aðalfundinum vistu HB keldur at siga, at felagið ætlaði at skjóta Heðin Askham upp sum nýggjan næstformann. Hetta ætlaðu teir at gera, um Børge B. Hansen fór at taka seg aftur og ikki fór at verða í uppskoti til næstformann. Men Børge var í uppskoti, og tí varð einki at ætlanini um at stilla Heðin Askham upp.

Við at skjóta Heðin Askham upp sum eykalim vildi HB ivaleyst geva til kennar, at teir halda seg hava ein kvalifiseraðan mann, sum er klárur at koma í nevndina, tá ið nýggjur persónur aftur skal veljast. Men í fyrstu atløgu miseydnaðist royndin fullkomuliga.

Heðin Askham er annars væl kendur í Fótbóltssambandinum. Hann hevur í fleiri ár verið liðleiðari hjá landsliðnum, og hann hevur verið sera væl umtóktur av spælarunum, venjarunum og øllum hinum, sum hava havt við landsliðið at gera.

Um eitt ár fæst at síggja, um HB aftur fer at skjóta Heðin Askham upp, og um hann tá fer at fáa størri undirtøku, enn hann fekk hesa ferð. Tað tóktist sum um HB hesa ferð ikki hevði gjørt heimaarbeiðið ella fyrireikingararbeiðið nóg væl.

## Afturval

Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali, og teir vórðu báðir afturvaldir. Óli Holm fekk seytjan atkvøður, og Jens Erik Magnussen fekk fimtan atkvøður. Sveinbjørn Danielsen var eisini í uppskoti, men hann fekk ikki fleiri enn sjey atkvøður.

Jens Erik hevur í øll árini verið tann av nevndarlimunum í FSF, sum hevur havt mest við landsliðið at gera. Áðrenn Óli Holm fór í landsstýrið hevði hann nógv við dómarar og dømingina at gera. Sveinbjørn Danielsen hevur tey seinastu árini verið kappingarstjóri hjá kvinnunum. Tað arbeiðið sigst hann hava røkt væl. Men tað ber ikki til at siga, at hann fekk eina álitisváttan á nevndarvalinum. Men talan var heldur ikki um nakra misálitisváttan. Sveinbjørn var eykalimur frammanundan, og hann er framvegis eykalimur.




VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

PRIX
NR. 38 • TÝSDAGUR • 25. FEBRUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**4. umfar**

Leygarkvøldið var fjórða innleiðandi umfar í Prix Føroyum hildið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Páll Finnur Páll
Chain
MMM
Makrel
Fluffy Toys
Side Effect

10 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu.

Makrel var nummar 1 og vann sær pláss í finaluni. Fluffy Toys var nummar 2 og skal spæla í eini hálvfinalu saman við fýra øðrum bólkum, har besti bólkurin fær eitt finalupláss.

# Einar við fullari ferð

**Fluffy Toys tók áhoyrarafjøldina á bóli við vælspældum og svingandi rocktónleiki. Tað var lítið nýskapandi yvir tónleikinum, men bólkurin spældi sera væl og fekk lív í fjøldina**

FLUFFY TOYS
*Eyðun Klakstein*


*Einar Jacobsen var í rætta essinum leygarkvøldið. Lívliga framførslan hjá honum og hinum í Fluffy Toys tók áhoyrarafjøldina á bóli, og dómararnir løntu teimum fyri avrikið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sangarin í bólkinum Fluffy Toys var fegin eftir Prix-kappingina leygarkvøldið. Og kanska ikki alíkavæl.

– Eg hevði biðið um, at vit blivu nummar 1 ella longri afturi í røðini. Bara ikki nummar 2, segði Einar Jacobsen.

Men tað var júst tað, sum hendi. Fluffy Toys gjørdist nummar 2, og tí skal bólkurin royna at spæla seg í finaluna saman við fýra øðrum 2'arum.

– Nú skulu vit aftur til at stríðast og strevast fyri at fáa alt at sita til hálvfinaluna, og tað verður strævið. Vit hava nógv annað enn tónleik at hugsa um, so tað er ikki tann sama tíðin til avlops, sum tað plagdi at vera.

## Fyri tort og sviða

Bólkurin Fluffy Toys hevur verið virkin síðani 1999, og teir hava spælt nógv kring landið. Teir hava verið á skránni í Kagganum, Lognbrá, Klaksvíkar Klubba, TB-húsinum og aðrastaðni. Leygarkvøldið verða teir aftur upp á fartin.

– Hesa seinastu tíðina hava vit nýtt okkara allarseinastu orku til at venja til Prix Føroyar, og tað hevur verið sera tungt. Nú skulu vit ígjøgnum alt einaferð afturat, so vit kunnu vera væl fyri um tvær vikur, sigur Bjarti Hansen, gittarspælari í bólkinum.

– Vit eru ikki í somu støðu, sum teir ungu tónleikararnir eru. Teir hava lítið annað enn tónleik at hugsa um, og teir kunnu gera nógv við tað. Fyri okkum er hetta eitt ítrív, og tí krevur tað nógv av okkum, tá ið vit nú eru við í Prix Føroyum. Men fólk skulu tó ikki fara skeiv. Eg eri sera, sera fegin um úrslitið í kvøld og at fólk tóku so væl ímóti okkum, sigur Bjarti.

– Ja, tað er hóast alt gott at fáa nakað fyri tort og sviða, leggur Einar Jacobsen afturat við einum smíli.

## Tónleik sum teir tíma

Fluffy Toys spælir tað, sum onkur vil kalla gammeldags rock, meðan onnur heldur brúka heitið klassiskur rockur. Íblásturin er úr sjeytiárunum, sum var eitt gylt rocktíðarskeið.

Tað var ikki fyrr enn fyri kortum, at Fluffy Toys fór at skriva sínar egnu sangir, og teir ætla ikki at gevast á hondum.

– Vit ætla at gera onkran nýggjan sang til hálvfinaluna um tvær vikur, so vit kunnu bjóða fólki okkurt nýtt tá, sigur Einar Jacobsen.

– Vit leggja dent á at spæla tónleik, sum okkum dámar væl. Vit ynskja at fáast við tað, sum vit tíma, og so geva vit áhoyrarunum alt tað, sum vit hava í okkum, tá ið vit fara á pallin.

Hesin frymilin og gott tónleikaligt handverk gav bonus leygarkvøldið, og bólkurin hevur nú fingið enn ein møguleika at náa finaluni.

– Eg haldi, at vita hava eins góðan møguleika sum hinir 2'ararnir fyri at koma í finaluna, sigur Bjarti Hansen.